# Yvir 200 avsløg uppá ansingarpláss

**Tørvurin á ansingarplássi er stórur í høvuðsstaðnum og í ár eru tað yvir 200 børn, sum ikki sleppa inn á stovn. Tó verður upplýst av Snarskivuni, at tølini væntandi fara at broytast, og fleiri verða tikin inn, av tí at nøkur taka ikki altíð av**



*Yvir 200 børn í Tórshavnar Kommunu sleppa ikki í barnagarð ella í vøggustovu aftaná summarfrítíðina. 176 børnum vantar enn vøggustovupláss og 45 børn standa enn á bíðilista til barnagarðspláss*
*Tilvildarlig mynd*

BARNAANSING
*Ingrid Bjarnastein*

Nú eru brøvini komin. Nøkur hava fingið játtandi svar, og nøkur hava fingið noktandi svar. Talan er um brøvini frá Tórshavnar Býráð, har foreldur at børnum, sum hava søkt um barnaansing, fáa at vita, hvør teirra barn fær eitt pláss eftir summarfrítíðina ella ikki.

– Yvir 400 børn eru tikin inn í barnagarð, vøggustovu og dagrøkt, verður upplýst av Snarskivuni.

Men enn eru tað fleri, sum standa á bíðilista. 176 børnum vantar vøggustovupláss og 45 børn eru ikki sloppin í barnagarð.

– Hesi tølini fara tó væntandi at broytast. Tað eru altíð fleiri, sum takka nei, so vit vænta, at tey 45 børnini, sum ikki eru sloppin í barnagarð sleppa inn hóast alt.

197 børn koma úr dagrøktarskipanini í ár. Men bert 105 eru tikin inn fyribils. Hetta kemst av, at dagrøktarbørn nú eisini kunnu standa á vøggustovulista, og tí má eitt glopp verða, so ov nógv børn ikki verða tikin inn, tí annars kann verða, at pláss verður lovað uttan at tað er nakað.

Til útibarnagarðar var ongin bíðitíð í fjør. Børnini sluppu beinleiðis inn, og soleiðis vænta tey á Snarskivuni verður aftur í ár.

– Áhugin fyri útibarnagarðum er ikki so stórur. Tað er helst tí, at nakrir av teimum liggja so avsíðis, so ein má hava bil fyri at sleppa framat. Eisini skulu børnini vera fimm ár fyri at sleppa í útibarnagarð, sigur Snarskvian.

Frá Snarskivuni siga tey annars, at ein kann vænta umleið eitt ára bíðitíð til vøggustovupláss. Gingið verður eftir uppskrivingardegi, so tað er tann, sum stendur fremstur á listanum, sum sleppur framat. Eitt ára bíðitíð er als ikki óvanligt til eitt vøggustovupláss.

# Sjálvstýrið vil hava greiðu á støðuni

**Tolið hjá Sjálvstýrisflokkinum er eisini um at vera uppi**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

– Hvørki Sjálvstýrisflokkurin sum samgonguflokkur ella Føroya fólk, kann liva við tí óvissu sum valda hevur í longri tíð, og ferð Sjálvstýrisflokkurin tí á samgongufundi í komandi viku at fáa greiðu á politiska samstarvinum, og mæla til fastar mannagongdir tá ógreið ivamál stinga seg upp í samstarvinum, so at sleppast kann undan ógreiða og møðsama "samarbeiðinum" sum hevur valda millum Fólka- og Tjóðveldisflokkin.

Soleiðis skrivar Sjálvstýrisflokkurin í tíðindaskriv, sum er skrivað hósdagin.

– Sum ein av teimum fýra flokkunum, sum eru parlamentariska grundarlagi undir sitandi samgongu, hava vit gjørt okkara samgongufeløgunum greitt, at støðan, sum hevur valda seinastu mánaðirnir, ikki kann halda fram.

Sagt verður:

–Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins hevur á fundi í Eysturoynni í dag viðgjørt álvarsomu trupulleikarnir, sum samgongan er í, og sum hevur skaða álitið á alla ta politisku skipanina.

Uppgerðin millum Fólka- og Tjóðveldisflokkin sum byrjaði tá tingi var sett á Ólavsøku herðist í hvørjum, og varð hetta byrjanin til eitt innanhýsis stríð, sum letur upp fyri, at ósemjur koma undan kavi og vaksa seg stórar. Álvarsomu uppgerðirnar millum báðar flokkarnar gágnar á ongan hátt menningini av fólkastýrinum, men máðar tvørturímóti støði undan vanligari mannahugsan um politikk og politisk viðurskiftir, og seinasta nosið hevur viðført, at Tjóðveldisflokkurin tók "timeout" í vikuskiftinum.

Tíðindaskrivið er undirskrivað av Lasse Klein, landsnevndarformanni Sjálvstýrisfloksins.

# Heðin í nevndina

**Havnar Framburðsfelag hevði aðalfund á Grækarismessu**

**Tíðindaskriv**



*Heðin D. Poulsen er nýggjur nevndarlimur í Havnar Framburðsfelag, sum hevði aðalfund á Grækarismessu.*

Havnar Framburðsfelag, valfelag Fólkafloksins í Suðurstreymi, hevði, sum føst siðvenja er, havt ársaðalfund sín á Grækarismessu.

Í ár stóðu tríggir av teimum fimm nevndarlimunum fyri vali. Tey vóru Jan Christiansen, Aage Arnoldson og Katrin D. Johansen.

Katrin D. Johansen, ið hevur verði nevndarlimur tey seinastu nógvu árini, bar seg undan avftur vali.

Í hennara stað var Heðin D. Poulsen einmælt valdur, meðan Jan Christiansen og Aage Arnoldson somuleiðis einmælt vóru aftur valdir.

Nevndin er nú mannað soleiðis:

Aage Arnoldson, formaður, Petur Olsen, skrivari, Øssur Dam Jacobsen, kassameistari, Jan Christiansen og Heðin D. Poulsen.

Aftaná tey formligu viðurskiftini vóru avgreidd var politiska støðan á skránni.

Løgtings- og landsstýrismenn okkara greiddu frá politisku gongdini og støðuni og svaraðu spurningum og viðmerkingum frá fundarfólkinum.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í Fiskivinnumálum, var eisini á fundinum og greiddi frá gongdini í fiskivinnumálum.

At enda greiddi Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavn, frá gongdini í kommununi seinastu árini. Eisini greiddi hann frá teimum ætlanum kommunan arbeiðir við í ár og komandi árini.

Vikuskifti
Nr. 52 • leygardagur • 15. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Útoyggjahurlivasi

Rakul Guðjónsson hugleiðir um, hvussu tað er at búgva í útoyggj



Lesið síðu 6 & 7



*Katrin Bonde, sum júst er útbúgvin teaturskræddari, hevur seymað búnarnar til Per Gúnt, sum Gríma frumframførir um eina viku*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Størsta avbjóðingin higartil

Katrin Bonde varð í heyst útbúgvin teaturskræddari. Hon er í løtuni heima í Føroyum, har hon hevur seymað búnar til stórsjónleikin hjá Grímu, Per Gúnt, sum hevur frumframførslu um eina viku. Katrin sigur, at tað at seyma búnar til Per Gúnt er størsta avbjóðingin hon hevur fingið higartil

SJÓNLEIKALÍV
*Ingrid Bjarnastein*

27 ára gamla Katrin Bonde úr Havn hevur fingið eina stóra uppgávu um hendi. Hon hevur seinastu vikurnar gingið og malið niðri á Gamla Meiarínum, har Leikhúsið Gríma heldur til. Uppgávan hjá Katrin hevur nevniliga verið at seyma búnar til stórsjónleikin, sum Gríma frumframførir í dag, Per Gúnt.

- Eg eri glað fyri, at eg havi kastað meg út í eina so stóra uppgávu, sigur Katrin Bonde, sum seinasta heyst varð útbúgvin teaturskræddari.

- Hetta er jú ein stórur sjónleikur í Føroyum, og havi eg lært so nógv. Ikki bara um meg sjálva, men eisini um sjálvt fakið.

**Útbúgvingin**

Katrin Bonde hevur nomið sær útbúgving á Semenariet for formgivning í Nykøbing Falster. Hon býr á Amager í Keypmannahavn, og meðan hon hevur gingið í skúla, hevur hon ferðast ímillum

- Eg var við í fyrsta flokkinum, sum lærdi til teaturskræddarar á hesum skúlanum. Skúlin hevði áðrenn sett seg í samband við sjónleikafeløg í Danmark og spurt, um tørvur var á teaturskræddarum, og tað vóru fleiri sum søgdu ja, og tí gjørdu tey eitt royndarár, har eg so var við, greiðir Katrin frá.

Hon heldur, at skúlin var ein góður skúli. Tilfarið tú arbeiðir við á einum slíkum skúla er jú heilt øðrvísi enn um tú gekk á einum vanligum skræddarskúla.

- Úttrykkið í einum búna skal vera nógv størri enn á vanligum klæðum. Vit hava lært um uppsetan, ljós, palluppsetan og so víðari. Tú lærir, hvussu tú fært ein búna at síggja út sum ein millión, men so bara er ein kloddi tá tú kemur nærri, fortelur teaturskræddarin.

- Tú lærir, hvussu tú samansetir tingini praktiskt. Ein kjóli skal bæði kunna verða stuttur og langur, og ein vestur skal kunna vendast. Á einum palli gongur alt so skjótt fyri seg, so hetta skal vera praktiskt gjørt.

Katrin sigur annars, at Per Gúnt, sum hon nú hevur gjørt búnar til er ein blandaður sjónleikur. Har eru búnar, sum eru seymaðir upp á sjónleikarar, og so eisini aðrir búnar, sum meira fylgja »sjónleika-look'inum«.

**Avbjóðing**

Hetta er ikki fyrsta ferðin Katrin arbeiðir hjá Grímu. Hon var eisini við til at gera búnar, tá Móðir Sjeystjørna varð spæld fyri nøkrum árum síðani.

- Men Per Gúnt er avgjørt tann størsta avbjóðingin, eg havi fingið. Og tað er eisini deiligt at fáa mínar fyrstu royndir her heima í Føroyum. Eg haldi tað er gott at byrja í heimliga umhvørvinum, sigur Katrin.

Hon sigur annars eisini, at arbeiðið sum teaturskræddari er rættiliga merkt av árstíðini. Fleiri, sum arbeiða innan hetta yrkið í Danmark, arbeiða dagliga við onkrum ørðum, sum hevur við yrkið at gera, og so hava ymsar verkætlanir koyrandi við síðuna av. Og Katrin væntar, at soleiðis verður tað eisini fyri hana.

- Eg vænti, at ein kemur at arbeiða rættiliga nógv sum freelance. Men enn veit eg ikki rættiliga, hvat eg vil. Møguleikarnir eru nógvir í Danmark, men eg vil ikki rættiliga binda meg til nakað enn.

Per Gúnt er annars størsti sjónleikurin, sum Leikhúsið Gríma hevur sett upp niðri á Gamla Meiaríi. Heili 10 leikarar eru við og tilsamans hava teir einar 40 leiklutir. Per Gúnt verður frumframsýndur um eina viku.